# Bókanýtt

*Lagt til rættis: Dorit Hansen*

## Upplýsandi bók um seyðalitir




Gudmund Niclasen hevur í fleiri ár samlað og niðurskrivað vitan um føroyska seyðaslagið og seyðalitir. Hetta arbeiðið er nú komið út í bók við heitinum, Seyðalitir.

Í bókini eru litheiti úr øllum landinum víst við myndum og frágreiðing, sum Gudmund Niclasen, hevur fingið frá seyðamonnum kring landi.

Gudmund Niclasen hevur gingið á fjall frá smádreingi av og byrjaði í 198 sum seyðamaður á Tjørndalsegg í Miðvági. Hann fór tá beinanvegin at spyrja aðrar seyðamenn sum seyðalitirnar og skilti skjótt, at tað skuldi myndir til fyri at vísa hvussu liturin sá út, tí, sum sæst í bókini, er næstan altíð meira enn ein háttur at nevna eitt litheiti.

Bókin er ætlað seyðamonnum, bóndum, fjallafólki, traðarmonnum, og annars øllum, sum hava við seyð at gera ella eru áhugaði á at práta um seyð. Bókin fæst í bókhandlum og øðrum handlum runt landið.

